

Stjórin á Jarðfeingi, Petur Joensen, kunnar kinesisku sendifólkini um lógar- og loyvisviðurskifti.

# Kinesarar kunnaðir um føroyska oljuleiting

Deil:

**Jan Müller**

13.10.2014 - 17:04

Oljan.fo

Fríggjadagin 26. september vóru fólk frá kinesisku sendistovuni í Keypmannahavn á vitjan á Jarðfeingi.

Tey vóru áhugað at hoyra um oljuleiting í Føroyum, og á fundi vórðu tey kunnað um arbeiðsuppgávur hjá Jarðfeingi, lógar- og loyvisviðurskifti, og um skattaviðurskifti viðvíkjandi oljuleiting.

Eisini hoyrdu tey um oljuleitingarsøguna í Føroyum, boraðar brunnar og datamongd í økinum og fingu innlit í føroysku jarðfrøðina.

Kinesisku umboðini buðu sær til at verða til hjálpar at fáa sambandi við oljuvinnuna í Kina, nú arbeitt verður við at marknaðarføra føroyska landgrunnin til oljuleiting skrivar Jarðfeingi á síni heimasíðu.

Link til heimasíðuna "Ministry of Commerce People's Republic of China" har myndir frá Føroya-vitjanini eru at síggja:

http://english.mofcom.gov.cn/article/newsrelease/counselorsoffice/bilateralexchanges/201410/20141000753663.shtml